# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

Tórshavnar Kvøld- og Ungdómsskúli:

## Seinasta av trimum framsýningum í Smiðjuni



*Tey sum sýna fram í Smiðjuni eru f.v.: Malan Rubeksen, Havn, Sigvard Steffensen, Kollafjørður, Rúna Solberg Olsen, Kollafjørður, Jóhanna Jacobsen, Kollafjørður, og Randi M. Gunnarsdóttir, lærari.*
*Fremst: Fróði Hammer, Kollafjørður, Bergfríð Anthoniussen, Kollafjørður, vantar á myndini.*

*Mynd: Magnus Gunnarsson*

**Hósdagin 17. februar kl. 12 lat seinasta framsýningin hjá Tórshavnar Kvøld- og Ungdómsskúla undir heitinum »Spírandi list« upp í Smiðjuni í Lítluvík**

Næmingarnir ganga á Tórshavnar Kvøld- og Ungdómsskúla í Havn og í Kollafirði.

Framsýningin er opin til og við leygardagin 19. februar, allar dagar frá kl. 12-19.

Malan Rubeksen og Randi M. Gunnarsdóttir, sum eru við á framsýningini, koma at sýna fram til líka til mikudagin 23. februar við enn fleiri málningum.

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum sýndu samkenslu,
tá okkara kæri maður, pápi, verpápi og abbi

**Oliver Olsen**
(vanl. nevndur Olivar á Geilini, ætt. úr Svínoy)
Klaksvík

doyði og fór til gravar.

Tøkk fyri blómur, kransar, gávur til Zarepta
og til tykkum, sum fylgdu honum
til hansara seinasta hvíldarstað.
Tøkk øll somul.

**Johanna**
**Ruth, Fróði, Johanna og Jenný**

**70 ár**

19. februar verður Alma Askildsen, Tórshavn, 70 ár. Dagurin verður hildin frá kl. 10.00-15.00 heima hjá Oddvør og John Martin í Djóra í Geilsgøtu 37.

**Dagurin**
**17. februar. Findanus,** deyður ár 603. Írskur abbati í kleystrinum Cloneenagh í Írlandi.

veitst tú ikki tað?
Sosialurin

Sosialurin
www.sosialurin.fo

Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin
-har tað hendir
Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin